gult14 cyan14 magenta14 svart14



**FISKIVINNUTÍÐINDI**

## Gólvuppboðssølan

Gólvsølan

63 bátar seldu góð 31 tons um Gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mánadagin. Av hesum varð helmingurin landaður á Toftum. Seks tons vórðu í Klaksvík meðan góð fýra tons vórðu landað í bæði Sørvági og Vági

| Syslunummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 79 | Havørnin | snella | 155 |
| FD 205 | Greta | lína | 2.463 |
| FD 310 | Sjóberin | lína | 89 |
| FD 316 | Annfríð | snella | 246 |
| FD 428 | Margit J | lína | 166 |
| FD 581 | Sigmund | lína | 319 |
| FD 591 | Maria | lína | 170 |
| FD 783 | Glúpur | lína | 4.415 |
| FD 863 | Heidi | lína | 589 |
| FD 992 | Kúrberg | lína | 71 |
| FD1148 | Hellisberg | lína | 748 |
| KG 125 | Bjarnaberg | lína | 628 |
| KG 127 | Skurðaklettur | lína | 2.282 |
| KG 172 | Syðratangi | lína | 266 |
| KG 303 | Gerd | lína | 228 |
| KG 561 | Fagriklettur | lína | 1.178 |
| KG 578 | Sjey systrar | lína | 27 |
| KG 642 | Bragd | lína | 735 |
| KG 681 | Nestindur | lína | 385 |
| KG 706 | Skýliskletttur | lína | 672 |
| KG 742 | Guðrun | lína | 92 |
| KG 92 | Øldan | lína | 148 |
| TG 10 | Evi | snella | 280 |
| TG 103 | Lómurin | snella | 108 |
| TG 159 | Vesturbúgvin | snella | 251 |
| TG 26 | Majbritt | snella | 405 |
| TG 339 | Báran | snella | 69 |
| TG 349 | Trý drangur | snella | 400 |
| TG 40 | Kambur | snella | 87 |
| TG 435 | Jórun | snella | 280 |
| TG 514 | Keldafossur | snella | 761 |
| TG 523 | Sóley | snella | 312 |
| TG 592 | Jenny b | snella | 450 |
| TG 670 | Víkaberg | snella | 393 |
| TG 7 | Nesborg | partrol | 53 |
| TG 797 | Norðfarið | snella | 69 |
| TG 95 | Fløtunes | snella | 523 |
| TN 149 | Ørvur | snella | 130 |
| TN 157 | Solo | snella | 153 |
| TN 390 | Trý systkin | lína | 1.544 |
| TN 449 | Research | partrol | 147 |
| TN 712 | Teistaklettur | lína | 868 |
| TN 753 | Tóra | lína | 2.576 |
| TN 892 | Nøvan | snella | 72 |
| TN 897 | Maj-n | snella | 170 |
| TN 986 | Stjørnan | snella | 111 |
| VA 105 | Barið | snella | 486 |
| VA 109 | Ella | lína | 673 |
| VA 115 | Lómur | snella | 89 |
| VA 190 | Sjóberið | lína | 125 |
| VA 192 | Havfrúgvin | snella | 44 |
| VA 221 | Carina | lína | 1.195 |
| VA 242 | Suðurfarið | snella | 72 |
| VA 275 | Áardánjal | snella | 28 |
| VA 294 | Nestangi | lína | 472 |
| VA 34 | Dunga Hans m/b | lína | 456 |
| VA 350 | Sirið | snella | 306 |
| VN 125 | Ægir | snella | 191 |
| VN 132 | Tordis m/b | snella | 167 |
| VN 156 | Hanus á bø | snella | 90 |
| VN 168 | Vitin | snella | 268 |
| VN 513 | Klettur | snella | 177 |
| VN 520 | Hvannadalur | snella | 113 |

| Vørunavn | kilo | | |
|---|---|---|---|
| Annað | 10 | Skrubba | 89 |
| Brosma 0 | 107 | Steinbítur | 96 |
| Brosma 3&4 | 50 | Toskur 1 | 35 |
| Hýsa 0 | 12 | Toskur 2 | 977 |
| Hýsa 1 | 1.643 | Toskur 3 | 3.631 |
| Hýsa 2 | 2.567 | Toskur 4 | 2.655 |
| Hýsa 3 | 2.506 | Toskur 5 | 1.366 |
| Hýsa 4 | 1.376 | Tunga 0 | 7 |
| Havtaska 0 | 9 | Upsi 0 | 524 |
| Hvítingur 0 | 12.504 | Upsi 2 | 242 |
| Kalvi 2 | 10 | Upsi 3 | 329 |
| Kalvi 3 | 6 | Upsi 4 | 307 |
| Kalvi 4 | 47 | | |
| Kalvi 5 | 1 | | |
| Longa 0 | 37 | | |
| Longa 4&5 | 19 | | |
| Longa 5 | 71 | | |
| Reyðsprøka 0 | 1 | | |
| Skøta | 2 | | |

# Trupuleikar í útflutningi til Noreg og Ísland

Eftir at heilsufrøðiliga avtalan var gjørd við ES, varð tikið sum givið, somu reglur vóru galdandi fyri EBS-londini. Nú hava trupulleikar stungið seg upp viðvíkjandi útflutningi til Noreg og Ísland.

Í sambandi við, at Føroyar og ES hava fingið ásetingar í sínámillum handilssáttmálan um heilsufrøðiligu viðurskiftini partanna millum, hava ávís ivamál tikið seg upp viðvíkjandi støðuni millum Føroyar og ávikavist Ísland og Noreg, skrivar Vinnuhúsið.

Vinnan hevur seinastu vikurnar ásannað, at tá útflutt verður til omanfyrinevndu lond, er enn neyðugt við heilsuváttanum úr Føroyum, og at vøran fer um eina marknaðareftirlitisstøð (MES). Hildið hevur verið, at hesar mannagongdir eisini eru broyttar á sama hátt sum mannagongdirnar, tá útflutt verður úr Føroyum til ES-marknaðin. Vinnan hevur víst mynduleikunum á óhepnu støðuna.

Frá uttanlandsdeildini undir Løgmansskrivstovuni verður ásannað, at heilsufrøðiligi ískoytissáttmálin millum Føroyar og ES er ein tvílanda sáttmáli millum partarnar. Tað vil siga, at tær ásetingar, sum eru í sáttmálanum, bert er galdandi fyri viðurskiftini millum sáttmálapartarnar. Ísland og Noreg eru ikki partar av sáttmálanum, og tí er einki broytt viðvíkjandi handli úr Føroyum til hesi lond, hóast Ísland og Noreg á ávísum økjum, eins og Føroyar, hava sett í gildi felagsskapsrætt.

Í heilsufrøðiligum høpi eru Ísland og Noreg sostatt at meta sum triðjalond hjá Føroyum, og umvent eru Føroyar at meta sum triðjaland hjá Íslandi og Noreg. Vørur millum hesi lond eiga tískil at verða viðgjørdar, sum vørur úr triðjalondum.

Uppá fyrispurning frá Vinnuhúsinum sigur Løgmansskrivstovan, at arbeitt verður við at fáa trupulleikan loystan í samstarvi við ES, Ísland og Noreg. Ikki er neyðugt við líka umfatandi sáttmála sum hann, gjørdur er við ES. Ísland og Noreg hava jú longu líknandi sáttmála við ES. Tað, sum arbeitt verður við í løtuni, er at fáa gjørt avtalur millum londini sum siga, at londini eru samd um at steðga heilsufrøðiliga eftirlitinum á teimum vørum, har partarnir hava somu reglur og ásetingar at halda seg til.

Nær hetta verður liðugt er ilt at siga, men roynt verður at finna eina skjóta loysn. Føroyar, Ísland og Noreg hava tætt samskifti við hvørt annað um hetta, og væntandi verður málið eisini tikið upp á felagsnevndarfundinum millum Føroyar og ES tann 29. í hesum, skrivar Vinnuhúsið.

# Føroysku nótabátarnir í íslendskum sjógvi

Føroysku nótabátarnir eru nú í íslendskum sjógvi. Nakrir eru á lodnuveiðu og hinir á svartkjaftaveiðu. Næraberg hevur roynt eftir svartkjafti í íslendskum sjógvi og tá frættist, at hann fekk fisk, fóru hinir nótabátarnir at sigla. Chr. í Grótinum var staddur á sildaleiðini norðuri á 70 stigum. Hann hevði nakað av sild inni, sum hann hevur landað í Íslandi. Hann er nú farin á svartkjaftaveiðu.

Norðborg er enn á sildafeltinum á 70 stigum norður í altjóða sjógvi. Tað er ikki so nógv at fáa nú. Norðborg frystir umborð.

Útróðrarformaður:

# Sumt er langt úti

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Ein av teimum frá vinnuni, sum fylgdi væl við á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í seinastu viku, var formaðurin fyri Meginfelag Útróðrarmanna. Hann varð valdur til formann í fjør og tað er eitt sindur ymiskt, hvat hann heldur um tað sum kom fram á stevnuni.

– Sumt er langt úti sum fiskifrøðingarnir siga og tí er ringt at taka teir fyri fult. Eitt nú so varð mælt til at fiska nógva hýsu í fjør, og nú ætla teir at banna hýsuveiðu. Men hendan ráðstevna var áhugaverd. Vit hava fingið nógv at vita hesar dagarnar, ikki bara undir sjálvum fyrilestrunum, men eisini í práti uttanfyri. Eitt nú hava íslendingar viðgingið, at teirra skipan við kvotu er kollapsa og tað sigur okkum, at okkara fiskidagaskipan ikki er so galin. Verður stýrt ordiliga, so er framtíðin bjørt, sigur Eyðun Konráðson, ið sjálvur er íslendari, men sum flytti til Føroyar fyri 18 árum síðan.

– Eitt er tó greitt, at um fiskidagarnir verða frítt umsetiligir millum allar bólkarnar, so fara at henda broytingar í fiskiflotanum. Teir stóru útróðrarbátarnir fara at hvørva og um stutta tíð, so fara teir sum eiga fiskidagarnar eisini at krevja, at teir sleppa inn á línuleiðirnar at veiða og tá verur føroyskur útróður deyðadømdur, sigur Eyðun Konráðson.

– Útróðrarveiðan er umhvørvisvinarlig og hon er eisini bundin at einum øki. Hon skapar arbeiði í økinum. Og ein sannroynd er, at nærri tú er fiskigrunninum, tess meira følir tú fyri honum, sigur hann

– Sjálvur haldi eg, at myndugleikarnir hava ilt við at fata útróðurin sum eina vinnu. Ov fá fiskivinnukøn eru í umsitingini og alt sum vit rokna sum vanliga almenna vitan um fiskiveiðu, skulu vit skjalprógva við stabbum og øllum møguleikum. Hetta ger, at tað er tungt hjá okkum at samskifta við umsitingina, sigur Eyðun Konráðsson

gult15 cyan15 magenta15 svart15



# Clickhaze bjóðar av í Danmark

**Í gjár fóru fólkini í rockbólkinum Clickhaze til Danmarkar, har spennandi avbjóðing bíðar á tónleikafestivalinum í Nibe. Seinasta vikan við venjing og konsertum hevur verið sera strævin**

TÓNLEIKUR

*Eyðun Klakstein*



*– Vit stremba ikki eftir tí stóra gjøgnumbrotinum, nú vit fara til Danmarkar at spæla. Okkara mál er at spæla so væl sum gjørligt, og um tað so hevur okkurt við sær, so taka vit tað við eisini, sigur Jón Tyril, sum er ein av tónleikarunum í rockbólkinum Clickhaze.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tónleikararnir í Clickhaze vóru útlúgvaðir eftir vikuskiftið, tá tríggjar konsertir vóru á skránni. Tey spældu í Gøtu, í Havn og á Tvøroyri, og hetta kravdi nógv av bólkinum.

Strævnað vikuskiftið var aðalroyndin áðrenn ferðina til Danmarkar, har Clickhaze skal vísa sínar dygdir á Nibe Festivalinum.

– Vit eru við at koma fyri okkum aftur, og vit fáa nakrar dagar at fyrireika okkum í Danmark, áðrenn vit skulu spæla har fríggjadagin, segði Jón Tyril, tá vit høvdu hann í telefonini av flogvøllinum beint fyri middag í gjár.

Á middegi fóru hann og restin av fólkunum í Clickhaze til Danmarkar við Atlantsflog. Tey skuldu lenda í Billund, og haðani varð leiðin løgd til Nibe, sum liggur nærindis Aalborg norðaliga á Jútlandi.

### Nýggjar sangir

Clickhaze fekk kjansin á Nibe Festivalinum umvegis framførsluna í Prix Føroyar finaluni, sum bólkurin úr Eysturoynni vann.

Umboðið fyri Nibe var hugtikin av føroyska rockbólkinum og vildi hava hann at spæla á sínum festivali. Clickhaze skal spæla fríggjakvøldið klokkan 23.00, og tað verður mett sum ein góð tíð at spæla.

– Vit hava fyrireikað okkum væl til ferðina. Vit hava vant nógv, og vit hava eisini spælt á fleiri konsertum. Vit hava nýggjar sangir á skránni, og tað er umráðandi, at vit spæla hesar sangir fyri fólki, so vit vita, hvussu teir rigga, sigur Jón Tyril.

Hóast framførslurnar seinastu tíðina hava verið strævnar, hava tær givið góða barlast áðrenn ferðina til Danmarkar.

– Vit ætla at venja eitt sindur áðrenn konsertina fríggjakvøldið, og vit hava fingið eini venjingarhøli í Nibe, sum vit sleppa at brúka. Fyrireikararnir av Nibe Festivalinum hava verið ómetaliga blíðir og hjálpsamir mótvegis okkum, sigur Jón Tyril.

### Vænta sær nógv

Nibe Festivalurin væntar sær nógv av Clickhaze, og á heimasíðuni hjá sær hevur festivalurin gjørt nógv burtur úr føroyska bólkinum, sum teir halda kann fáa gjøgnumbrot uttan fyri Føroyar.

– Vit stremba ikki eftir tí stóra gjøgnumbrotinum, nú vit fara til Danmarkar at spæla. Okkara mál er at spæla so væl sum gjørligt, og um tað so hevur okkurt við sær, so taka vit tað við eisini, sigur Jón Tyril.

Clickhaze fer at spæla sangirnar, sum teir vunnu Prix Føroyar kappingina við, men teir hava eisini nakrar nýggjar sangir við. So at siga alt, sum tey spæla, er sjálvgjørt.

– Tað tykist sum danir dáma væl tað slagið av tónleiki, sum vit spæla, og tí eru vit sera spent at sleppa á pallin í Nibe, sigur Jón Tyril.

Clickhaze kemur heimaftur 4. juli, og longu dagin skulu teir spæla á konsert í Føroyum.

# Polarfarið til Lorvíkar

**Norðoya Sparikassi hevur keypt snøgga modellið av Polarfarinum, sum Hans Jacob Fuglø hevur gjørt. Polarfarið skal standa í deildini í Lorvík**

MODELLSKIP

*Eyðun Klakstein*

Norðoya Sparikassi hevur ognað sær Polarfarið, sum Hans Jacob Fuglø, bátabyggjari í Klaksvík, hevur gjørt.

Vakra modellskipið varð sýnt fram á norðoyastevnu, men nú kemur tað at standa í deildini hjá Norðoya Sparikassa í Lorvík.

Norðoya Sparikassi hevur áður keypt modellini av William Close, sum varð latið Sjómansskúlanum í Klaksvík, og av Ernestinu, sum varð latið Føroya Fornminnasavni.

Norðoya Sparikassi hevur eisini gjørt avtalu við Hans Jacob Fuglø um, at sparikassin skal keypa eitt modell av Polo, sum hann nú fer undir at byggja.

– Vit hava gjørt avtalu við Hans Jacob um hesi skip, tí vit ynskja at verða við til at varðveita hesi skipini í okkara øki, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa.

Hans Jacob Fuglø er tað er stórur áhugi fyri skipunum, sum hann hevur bygt.

Nógv av skipunum, sum hann hevur bygt, eru endað í Havn, men nú hevur Norðoya Sparikassi tikið stig til, at nøkur av hesum snøggu og neyvu skipunum verða varðveitt norðanfyri.



*Hans Jacob Fuglø var mánadagin í Lorvík við Polarfarinum. Leiðarin í deildini hjá Norðoya Sparikassa í Lorvík, Kristian Martin Eliasen, tók ímóti modellinum*

## Farnir at skifta vøllin

**Mánadagin fóru fólk undir at taka graslíkið av vøllinum í Klaksvík**

ÚTSKIFTING

*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Komandi vikurnar verður fótbóltsvøllurin í Klaksvík skiftur út. Mánadagin fóru arbeiðsfólk hjá Klaksvíkar kommunu undir at taka graslíkisteppið av vøllinum, og tá tað er gjørt verður nýtt graslíki lagt á vøllin.

Hetta er triðja ferðin, at graslíkið verður skift í Klaksvík. Fyrsti graslíkisvøllurin kom í 1988, og hann tænti væl í 10 ár. Vøllurin, sum hevur ligið á tvey tey seinastu árini, hevur ikki riggað eftir vild, og hann verður tí skiftur.

Trupulleikar hava verið við frárenslinum, og skal tað betrast, má nýtt graslíki leggjast á.

Tað fer at taka millum tvær og tríggjar vikur at skifta vøllin í Klaksvík, og hetta tíðarskeiðið verður skrúvað niður fyri virkseminum hjá KÍ.

Nýggi vøllurin í Klaksvík er av sama slagi sum vøllirnir, sum verða lagdir á í Gøtu og Runavík í hesum døgum.

